# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Henry Christophersen** fer úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið 19. juni klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju fríggjadagin 20. juni klokkan 15. Tey, ið vilja minnast Henry, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið í Vestmanna, konta í peningastovnunum.

**Jens Cramer, Århus**, andaðist mánadagin 16. juni, 68 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin 21. juni klokkan 10.00 frá Vor Frue Kirke, Vestergade 21, 8000 Århus C.

**Anna Elisabeth Vang, Tórshavn**, vanliga nevnd Lillan í Grønlandi, andaðist sunnudagin 15. juni, 90 ára gomul.

†

Góða mamma, omma og langomma okkara

**Anna Elisabeth Vang**

(Lillan í Grønlandi)

andaðist á Landssjúkrahúsinum 15. juni, 90 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin 21. juni kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Hervør og Maria**

†

Mánadagin 16. juni andaðist

**Óli Kurt Hansen**

Tórshavn

á Landssjúkrahúsinum, 73 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin 20. juni kl. 13.00.

Tey, ið vilja minnast Óla, kunnu geva Hjartafelagnum eina gávu.

**Dagurin**

**20. juni. Sylverius**. deyður ár 537. Hann var sonur pávans Hormisades og gjørdist seinni sjálvur pávi, men av politiskum grundum varð hann skjótt frákoyrdur. Navnið merkir Skógarbúgvi.

# Trina við Keldu 100 ár



Hon situr við stokkum í sínum lenistóli í stovuni. Hon bindur og bindur. Klútarnir skula vera 20 x 20 cm. Tá íð ein er liðugur, tekur hon annan tráð uppá og heldur áfram. At enda er ein favnur bundin til longdar. Onkur annar seymar tað saman til fagurlitt, snotuligt kloddateppi við snøggari rond uttanum. Og meðan hon bindur, veit hon, at í fjarløgdum londum leita fátækrafólk sær fløva undir kloddateppum hennara.

Undir liðini stendur vatnkannan. Tvær kannur skula tømast hvønn dag. Hon brosar og smílist og slær alt upp í glens, meðan gullstiftir skyggja í tanngarðinum. Teir vøkru, sólbrúnkaðu kvinnuleggirnir liggja fram á skammilin og fyriklæðið verjir kjólan móti ullráðnum og stokkunum. Hon er ikki í brillum. Trina er mest sum blind. Kortini bindur hon, skeinkir sær og ger sær ein bita.

Láturin. Hon lær og skemtast, undrast, spyr og sigur frá. Men ikki úr gomlum døgum, uttan tú spyrst hana. Hon sigur frá sínum næstu við Keldu í Leirvík, børnum teirra, barnabørnum teirra, útbúgving teirra og hvussu teimum gongst. Minni er sum ein telda. Hon undrast, men tað gerst tú eisini. Men tú undrast á hesa gomlu lívsjáttandi konuna, sum dregur fólk til sín. Heimahjálparkvinnur komu og fóru, men tær vitjaðu kortini aftur – og børn teirra. Kenningar og børn teirra. Hvussu kann ein 100 ára gomul eiga so nógv at taka av og lata øðrum.

Hon var barn Við Keldu í Leirvík. Pápin Jógvan Vitalis var keypmaður og deknur. Han noyddist at gevast at handla, var útróðrar- og fiskimaður. Mamman var Olevina f. Petersen uppi í Tungu í Mikladali. Hon plagdi at vera um sjúk og barnakonur. Dyrnar vóru víðopnar, so har vuksu børn upp, fullgingin og gomul fingu innivist. Hjartarúmið var vist nógv størri enn húsrúmið.

Trina fór niður at tæna, heimaftur og niðuraftur, fann danskan mann, Alfred Møller Jensen. Tey áttu mong ár saman, men hon hevur livað eini 25 ár eftir hann. Tey høvdu vaskarí og reinsarí í Klaksvík í fimtiárunum, fluttu niðuraftur, hann royndi seg sum heilsølumaður og at enda lótu tey reinsarí upp í Ørbæk á Fyn, har bróðursonur hennara arbeiddi. Hon fostraði eina systurdóttur upp og hjálpti systrini, sum fekk 12 børn, men Trina og Alfred fingu sjálvi eingi børn.

Og tú vendir aftur til Trinu í síni stovu í Ørbæk. Eitt guds undur. Er ikki ov nógv lot, setir hon seg á stólin úti á altanini og sólar sær í vesturskininum. Hon fer ikki longri enn íbúðin loyvir, hon er innandura. Men hugurin leitar aftur á løtur í torvi á Heygnum og á Vatnbhomrum, í hoyna uppi á Brekkum og hjá hálvu kúnni saman við farbróður. Henni rennur í hug løtur við sóljum uppi í bønum, løtur heima við hús uttan um trogið, morgun- og aftansálm og løtur á kirkjubeinki. Tó einki er sum slektin, tey næstu, vinfólk og kenningar.

Trina er summarbarn, fødd 18. juni 1908. Lyndið er sum hjá ungari gentu. Kát, spent og fró við barlast úr einum longum og fjølbroyttum lívi, har eisini tungar løtur vóru. Men summarið sleppur henni ikki. Tað er í sál hennara, har grør og blómar eisini á 100 ára degnum. Henni veri hjartaliga til lukku og tøkk fyri mangar hugnaligar løtur.

**Martin**

# Óli Kurt Hansen deyður

Mánadagin 16. juni andaðist Óli Kurt Hansen í Havn á Landssjúkrahúsinum, 73 ára gamal. Óli Kurt var havnarmaður og kendur skemtari, undirhaldari og sjónleikari.

Sum 14 ára gamal fór hann í bakaralæru hjá Frants Restorff, har var hann í tilsamans 7 ár. Eftir tað arbeiddi hann í minkagarðunum í Hoydølum í eini 3-4 ár, til hann fór til Íslands at arbeiða á einum bóndagarði á Bessastøðum. Ásgeir Ásgeirsson var íslendskur forseti í Íslandi tá. Seinni fór Óli Kurt til Reykjavíkar, har hann arbeiddi sum bakari í 3 ár.

Tá hann kom aftur til Føroya, fekk hann 1. oktober 1968 starv í køkinum á Landssjúkrahúsinum, sum var spildurnýggjur tá, og arbeiddi hann har til langt yvir pensiónsaldur. Tann 1. oktober 2003 kundi hann halda sín 35 ára starvsdag.

Óli Kurt var kendur innan sjónleik og barnaútvarp. Hann spældi sjónleik, tá hann búði í Íslandi, og hann spældi eisini sjónleik í Sjónleikarhúsinum í Havn, í Glæmuni í Kvívík og í Norðurlandahúsinum.

Óli Kurt var í barnaútvarpinum saman við Hermanni Jacobsen og síðan saman við Elini Mouritsen. Elin & Óli vóru sera væl umtókt millum bæði børn og vaksin miðskeiðis í 70-unum. Elin og Óli bergtóku hvørt mansbarn í Føroyum í orðsins sanna týdningi. Ikki bara hvørt einasta barn, men vaksin við - menn og konur, ung og gomul. Í 2003 kom ein dupultfløga út við brotum úr teimum væl umtóktu barnaløtunum hjá teimum.

